## Dimmumyndir á Landsbókasavninum




Í sambandi við mentanarnáttina letur Ole Wich framsýningina "Dimmumyndir – at tekna blaðið" upp á Føroya landsbókasavni fríggjakvøldið 6. juni. Sýndar verða fram myndir, sum Ole Wich hevur gjørt til Dimmalætting frá aug. 2005 og fram til í dag. Flestu myndirnar eru tekningar, ið eru teknaðar við hond og síðani viðgjørdar við teldu. Tær hava verið prentaðar í Skáanum, Blogguni og í Punktum.fo í Dimmalætting. Framsýningin letur upp klokkan kl. 20.00, og Landsbókasavnið hevur opið til kl. 22.00 hetta kvøldið.

# Maru Seafood í gjaldføristr

**- Eg stúri fyri gongdini, og óhugsandi er ikki, at alt virksemið kann fara av knóranum. Tá raksturin er so vánaligur, og útlitini eru so døpur, er vandin altíð til steðgar. Men vit royna, og eg vóni ikki, at tað verður so galið, sigur stjórin í Maru Seafood, Jóhan Páll Joensen, sum fer at hava aðalfund í næstum**

KREPPA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samtakið Maru Seafood er ein av teimum heilt stóru fiskivinnufyritøkunum í Føroyum, sum bæði hevur virkir og skip undir sínum hatti.

Virkini, sum felagið rekur í Klaksvík og á Eiði, hava út við 200 fólk í arbeiði, og einir 100 mans eru knýttir at teimum átta skipunum, sum felagið eisini hevur undir sínum hatti.

Felagið hevur rikið trý virkir, Kósina, Eystís, sum er gamla Roykivirkið í Klaksvík og Norðís á Eiði.

Á Eystís starvaðust eini 35 fólk, sum fingust við at roykja hýsu og upsa, men sama virksemi er eisini á Eiði. Fyri eini tíð síðan helt virksemið á Eystís uppat, og flestu arbeiðsfólkini endaðu á Kósini.

Bæði á Kósini, sum serliga virkar portiónir úr upsa og nakað av saltfiski og á Norðís á Eiði, sum roykir hýsu og upsa, hevur verið nógv arbeiði.

Tað hevur gingið rímiliga væl at manna Kósina, meðan truplari hevur verið at manna Norðís, har tørvur alla tíðina er á arbeiðsfólki.

Skipini, sum Mary Seafood eisini eigur meirilutan í, eru teir seks ísfiskatrolararnir Navarin og Borgarin, Nónhamar og Fjalshamar og Safir og Smaragd. Línuskipini eru Grani og Fugltúgvan.

Fleiri feløg eru undir hattinum hjá samtakinum Maru Seafood og stjórin, Jóhan Páll Joensen, letur sera illa at gongdini.

### Lagnan óviss

Maru Seafood fer at hava aðalfund ein av fyrstu døgunum, og fyrr enn tann fundurin verður, verður heldur ikki endaliga greitt, hvussu úrslitið hjá samtakinum fyri farna ár verður.

- Men tað er greitt, at úrslitið verður vánaligt, sera vánaligt, sigur Jóhan Páll Joensen.

Hann ásannar, at raksturin av virkseminum hjá samtak-



# Stórt prísfall á olju

**Tað eru góð tíðindi fyri eitt nú reiðarar og fiskimenn, at oljuprísurin fellir**

OLJA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í grein á heimasíðuni hjá Fiskeribladet Fiskaren verður sagt, at norðsjóvarolja við levering í juli verður seld fyri 124,3 dollarar fyri tunnuna. Hetta er eitt prísfall í mun til teir 128 dollararnar, sum tunnan annars hevur kostað um dagarnar.

Fiskimenn og onnur, sum eru bundin av, at prísurin fyri bunkring av olju ikki verður alt ov høgur, kunnu sambært norska blaðnum nú kenna seg eitt sindur lættari.

### Framvegis høgur

- Kortini skulu vit minnast til, at oljuprísurin framhaldandi er ógvuliga høgur, og tí skulu fiskimenn rokna við at gjalda nógv fyri bunkring.

Heimasíðan heldur, at fleiri tekin eru um, at oljuprísurin fer at fella.

Wall Street Journal skrivar, at í USA verður nú granskað, um prísirnir á olju hava verið útsettir fyri manipulatión.

Ein tunna av olju hevur kostað 135,90 dollarar, men seinastu tvær vikurnar hava stór prísføll verið.



*Granskarar eru farnir at kanna, um manipulatión er ein orsøk til høgu oljuprísirnar*